## Bilka úr Danmark

Flest allir føroyingar, sum hava verið í Danmark, munnu kennast við handlarnar Bilka, Føtex og Netto Tað er Dansk Supermarked, sum eigur handlarnar, og í gjár boðaði leiðslan frá, at hon leitar eftir nýggjum handilsumráðum til Bilka. Bilka-handilshúsini eru so stór, at donsk lóg loyvir ikki fleiri, og tí noyðast eigararnir av landinum at byggja. Serliga verður hugt at londum sum Týsklandi, Póllandi, Svøríki og Bretlandi, sigur DS.




*Dansk Supermarked hevði 1,9 mia. krónur í avlopi í fjør (Mynd: Polfoto)*

## Maria Mørkøre í Leikalund

Leygardagin letur upp nýggj listaframsýning í Leikalund. Maria sýnir fram oljumálningar, teir flestu málaðir í vetur.Málningarnir lýsa menniskju, náttúru, bygdaløg ella "stilllife". Hendan dagin verður eisini Noða í Leikalund og sýnir fram og selir sína vøru. Cafein hevur eisini okkurt gott at bjóða og hevur opið til kl 22.00.

# Linda samskipar ung í arbeiði

**Tiltakið »Ung í arbeiði«, sum stig varð tikið til í vánaligu tíðunum í 90-árunum, hongur við í fleiri kommunum, og í Havn hava tey ungu verið aktiverað á hvørjum ári síðani**

UNGDÓMUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tórshavnar kommuna hevur í ár valt at fingið Lindu Petersen at samskipa »Ung í arbeiði«, og hetta er gjørt út frá teirri sannroynd, at hon sum starvsfólk á Margarinfabrikkini longu frammanundan kennir fleiri av teimum ungu og er von at samskifta við tey.

Sjálv heldur Linda Petersen, at tiltakið kemur øllum pørtum tilgóða. Tey ungu verða aktiverað.

- Hjá teimum, sum ikki fara út at ferðast, kann summarfrítíðin mangan tykjast long, so her fáa tey ein gyltan møguleika at hava okkurt at fara upp til, samstundis sum tey forvinna sær nakrar krónur, sigur Linda Petersen.

Tey ungu fáa eisini møguliga fyri at nema sær kunnleika til handaligt arbeiðið. Kommunan hevur samstundis møguleikan at fáa ymiskt arbeiði gjørt, sum kanska liggur á láni. Tað fer fram á tann hátt, at kommunan setur fram ynski um, hvat tey kundu ynskt sær framt, og síðani verða tey ungu skipað í bólkar við einum bólkaleiðara og sett at gera hesi arbeiði. Ofta er talan um arbeiði, sum fríðka um kommununa.

Í næstum fer at verða søkt eftir bólkaleiðarum, sum saman við samskiparanum fara at hava ábyrgdina av at alt arbeiðið gongur sum tað skal.

### Tilmelding

Áður hava tey ungu meldað til um telefon ella teldupost, og hetta hevur til tíðir verið rættiliga kaotiskt. Tí hevur kommunan í ár valt at menna eina skipan til heimasíðuna www.torshavn.fo, har tey ungu melda til um heimasíðuna við at uppgeva navn og fartelefonnummar. Kommunan gevur teimum so boð um sms, um tey hava fingið arbeiðið, umframt at yvirlit verður lagt út á heimasíðuna yvir bólkaleiðarar og tey ungu. Melda verður til frá 19. til 30. mai.

Undanfarnu ár hevur verið stórur áhugi millum tey ungu at melda til, og foreldrini tykjast sera glað fyri, at børnini hava eitt arbeiði at fara upp til.

Tey ungu fáa tvær arbeiðsvikur í part, og í ár eru vikurnar 27, 28, 29 og 30 settar av til verkætlanina.



*Í ár verður tað Linda Petersen, sum hevur royndir frá Margarinfabrikkini, ið samskipar tiltakið »Ung í arbeiði«*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Eik 110 milliónir eftir hæli



*Órógv á fíggjar- og virðisbrævamarknaðinum sæst aftur í úrslitinum hjá Eik, sum er minkað úr 117,5 niður í 7,9 mió. krónur*

*Savnsmynd*

**Úrslitið í fyrsta ársfjórðingi hjá Eik-samtakinum gjørdist munandi verri enn í fjør. Eftir skatt er avlopið 7,9 mió. krónur móti einum avlopi upp á 117,5 mió. krónur fyrsta ársfjórðing í 2007. Við øðrum tølum slakar 110 mió. krónur eftir hæli. Áðrenn virðisjavnan, burturleggingar og skatt er talan um eina afturgongd upp á 3,7 mió. krónur**

FÍGGJARVINNAN
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Hóast avlopið er tóðnað rættiliga nógv, so er stór framgongd í inntøkunum hjá Eik-samtakinum fyrstu tríggjar mánaðarnar í ár. Hetta hóast órógvin á fíggjarmarknaðunum bar í sær minkandi vinningsbýti og kurstap av virðisbrøvum í fyrsta ársfjórðingi.

Úrslitið áðrenn virðisjavnan, burturleggingar og skatt er 109,7 mió. kr. móti 113,4 mió. kr. somu tíð í fjør. Orsøkin til afturgongdina á 3,7 mió. kr. er serliga, at vinningsbýtið fyrsta ársfjórðing í ár var 60,5 mió. kr. lægri enn sama tíðarskeið í fjør, skrivar Eik í tíðindaskrivi.

Úrslitið eftir skatt er 7,9 mió. kr. og sostatt munandi verri enn í fjør, tá avlopið var 117,5 mió. kr. í fyrsta ársfjórðingi.

Órógv á altjóða fíggjarmarknaðunum við fallandi partabrævakursum bar í sær, at virðisjavnan av virðisbrøvum og gjaldoyra gjørdust minus 87,9 mió. kr. móti einum kursvinningi á 17,7 mió. kr. somu tíð í fjør.

Samanlagt hevur minkaða vinningsbýtið og virðisjavningin tyngt roknskapin fyrsta ársfjórðing við 166,1 mió. kr. í mun til sama tíðarskeið í 2007.

Hinvegin eru inntøkurnar nógv øktar, og samanlagt gjørdust rentu- og ómaksgjøld netto 204,5 mió. kr. fyrsta ársfjórðing 2008 móti 178,8 mió. kr. sama tíðarskeið árið fyri. Hetta er ein vøkstur uppá 25,7 mió. kr. ella 14,4 prosent.

Rentu- og ómaksgjøld fevna eisini um vinningsbýti, sum var 5,0 mió. kr. í ár, samanborið við 65,4 mió. kr. sama tíðarskeið í fjør.

- Tað er positivt, at inntøkur bankans vaksa, og at grundleggjandi bankaraksturin er góður. Hinvegin slepst ikki undan, at órógvin á altjóða fíggjarmarknaðunum merkist hjá Eik. Kursirnir á partabrøvum bankans serliga í Atlantic Petroleum og í Spron vóru óvanliga lágir, tá fyrsti ársfjórðingur endaði. Talan er tó um langtíðar íløgur, og vanliga rættar partabrævamarknaðurin seg aftur, tá ein tíð er umliðin, sigur Marner Jacobsen, forstjóri í Eik Banka.

Leiðslan í Eik-samtakinum væntar framvegis, at úrslitið áðrenn virðisjavnan, burturleggingar og skatt verður 335 mió. kr. Hetta er 130 mió. kr. minni enn metárið í fjør, tá úrslitið var góðar 465 mió. kr.